


## Bolton fjepparar fyri hartan

Í eini fráboðan kunngjørdi Premier League felagið, Bolton Wanderers í morgun, at fjepparar felagsins, ið valdu at ferðast við liðnum til spanska høvuðsstaðin, til dystin í UEFA Cup í gjárkvøldið, vórðu offur fyri óregluligari viðferð av spansku løgregluni. Vánaliga viðferðin var framd áðrenn, meðan og aftaná dystin á Vicente Calderon leikvøllinum í Madrid. Dysturin millum Atletico Madrid og Bolton endaði við málleysum javnleiki, og av tí at Bolton vann fyrra dystin í Onglandi 1-0, er enska liðið víðari millum 16 tey bestu. Framferðarhátturin hjá spansku løgregluni, hevur fingið leiðsluna í Bolton at rópa varskó, og siga seg vera sinnaðar at fara víðari við málinum. Bolton stjórin Phil Gartside hevur lovað, at hann er sinnaður at fara til hægsta stað, í strembanini eftir at fáa greiðu á málinum. - Eg havi djúpa samkenslu yvir fyri fjepparum felagsins, ið hava fingið skaðar í hurlivasanum í Madrid í gjárkvøldið, sigur Phil Gartside fyri BBC-5-LIVE í morgun.

# Skulu vaska talvuna reina




*ÍF kvinnurnar Guðrun Lerwig, Katrin Olsen og Maja Filipovic, gleðast her um enn ein vunnan bólt móti SÍ. Næsta mótstøðulið teirra er Dráttur, og hesar vágagellurnar ætla sær óivað ikki at bakka*




*Esther Rasmussen og Maja Filipovic (meðan hon enn var í TB) blokka her eitt slag frá KÍF leikara*




*Karin Mikkelsen roynir seg her við slagi í steypafinaluni, meðan Tórfríð Tavsen og Annika Niclasen fylgja spentar við. Minumeðna netið hómast Maja Filopovic og Helen á Lakjuni*

**Eftir ósigurin í ársins steypafinalu móti ÍF, mugu SÍ kvinnurnar reisa seg aftur. Eitt væla høvi til tess, verður tá tær fara til høvuðsstaðin at dystast móti botnproppinum Fleyr**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

SÍ mugu royna at vinna sín dyst í Havn móti Fleyr, og tað skuldi eftir øllum brøgdum at døma, ikki verið mest møtimikla uppgáva teirra í ár. Men hvussu er og ikki, má dysturin vinnast, tí nýklaktu steypavinnararnar úr ÍF eru beint í hølinum á teimum.

ÍF tekur á heimavølli móti hinum vágaliðnum Drátti, og á Tvøroyri tekur TB móti KÍF. Einasta liðið, ið ikki spælur hetta vikuskiftið á kvinnusíðuni, eru klaksvíksgellurnar úr Mjølni. Men heilt frí fáa genturnar hjá Mjølni tó ikki, tí tær hava til uppgávu at døma allar flogbóltsdystirnar um vikuskiftið.

### TB ætlar sær fjórða pláss

Stóri spenningurin hetta vikuskiftið er helst, um TB megnar at knúgva KÍF, og harvið vinna seg ájavnt við KÍF og Mjølnir, ið bæði liggja við sjey stigum á stigatalvuni. Tó skal nevnast, at KÍF hevur væl betur settmun, enn bæði Mjølnir og TB.

### Menn á síðulinjuni

Hjá monnunum verður ongin dystur spældur um vikuskiftið, so teir hava eina kærkomna fríløtu. Fríløtan man uttan iva koma væl við hjá steypafinalistunum úr SÍ og Mjølnir, ið nýttu eina rúgvu av orku í finalunum, seinasta vikuskifti.

**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 14 | 13 | - | 1 | 41 | 10 | 31 | 15 |
| 2 ÍF | 14 | 12 | - | 2 | 38 | 15 | 23 | 14 |
| 3 Dráttur | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 23 | 12 | 12 |
| 4 KÍF | 14 | 6 | - | 8 | 26 | 26 | 0 | 7 |
| 5 Mjølnir | 15 | 6 | - | 9 | 24 | 33 | -9 | 7 |
| 6 TB | 15 | 4 | - | 11 | 19 | 36 | -17 | 5 |
| 7 Fleyr | 15 | 0 | - | 15 | 5 | 45 | -40 | 0 |

**Meistaradeild menn**

vunnin tapt sett-

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 446 | 339 | 107 | 27 |
| 2 VB | 15 | 9 | - | 2 | - | 4 | 355 | 319 | 36 | 20 |
| 3 Neistin | 15 | 9 | - | 0 | - | 6 | 367 | 351 | 16 | 18 |
| 4 Kyndil | 15 | 5 | - | 1 | - | 9 | 342 | 385 | -43 | 11 |
| 5 StÍF | 15 | 4 | - | 1 | - | 10 | 337 | 380 | -43 | 9 |
| 6 VÍF | 15 | 2 | - | 1 | - | 12 | 325 | 398 | -73 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 15 | 12 | - | 1 | - | 2 | 438 | 356 | 82 | 25 |
| 2 Neistin | 15 | 9 | - | 1 | - | 5 | 430 | 408 | 22 | 19 |
| 3 Kyndil | 16 | 9 | - | 0 | - | 7 | 435 | 435 | 0 | 18 |
| 4 VÍF | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 434 | 455 | -21 | 14 |
| 5 H71 | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 379 | 380 | -1 | 13 |
| 6 KÍF | 15 | 1 | - | 1 | - | 13 | 360 | 442 | -82 | 3 |